# Nýggi Smyril kann fáa somu lagnu sum Teistin og Brimil

**Skipara- og Navigatørfelagið krevur, at yvirmenninir, sum skulu við nýggja Smyrli, skulu hava lønarhækking. Tað var júst hetta, sum førdi til, at nýggja sandoyarferjan, Teistin og nýggja vaktarskipið, Brimil, lógu við bryggju í vikur og mánaðir, eftir at tey vóru liðug**



*Samráðingar um lønina hjá yvirmonnunum, sum skulu við nýggja Smyrli, eru longu byrjaðar. Men royndirnar av slíkum eru ógvuliga ringar og gongst sum tað plagar, er fryktandi fyri, at nýggi Smyril kemur at liggja bundin við bryggju í vikur ella mánaðir eftir, at hann er liðugur*

SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Verður tað so galið, at nýggi Smyril kemur at liggja bundin við kei í fleiri vikur, ella mánaðir, eftir at hann er liðugur?

Hetta er spurningurin, sum mong longu eru farin at seta sær, hóast nýggi Smyril ikki verður liðugur fyrrenn í oktober.

Og tað er ikki av órøttum, at hesin spurningurin verður settur, tí øll minnast, hvussu tað plagar at ganga, tá ið nýggj skip koma í flotan og sporini ræða.

Tá ið nýggj skip koma í flotan hjá Strandferðsluni ella Vaktar og Bjargingartænastuni, skulu samráðingar verða, hvussu skipið skal bólkast.

Tað stendur í sáttmálanum ímillum Skipara- og Navigatørfelagið og Fíggjarmálaráðið. Og hægri bólki, skipini eru í, betri er lønin eisini.

Hesi seinastu árini eru tvey nýggj skip komin í almenna flotan. Í 2000 kom vaktarskipið Brimil og í 2001 kom sandoyarferjan, Teistin.

Í báðum førum vóru samráðingar um lønina hjá yvirmonnunum. Men í báðum førum hendi eisini tað, at samráðingarnar gingu so illa, at skipini komu at liggja bundin við bryggju í vikur og mánaðir eftir at tey vóru liðug og klár at seta í sigling.

Og næsta ár kemur so skipið, sum ber av øllum í almenna flotanum: Nýggi Smyril, sum skal sigla ímillum Suðuroy og Havnina.

### Eru ongu byrjaðar

Ellintur Abrahamsen, formaður í skipara- og Navigatørfelagnum sigur, at samráðingar um lønina hjá yvirmonnunum, sum skulu við nýggja Smyrli, eru longu byrjaðar.

Hann sigur, at sáttmálin ímillum fíggjarmálaráðið og Skipara- og Navigatørfelagið um yvirmenninar við Strandfaraskipunum gekk út 1. desember.

Samráðingar eru byrjaðar um nýggjan sáttmála og í tí sambandinum hevur Strandferðslan biðið um, at samráðingarnar um yvirmenninar við nýggja Smyrli, verða tiknar upp í.

So tað væntar Ellintur Abrahamsen, at tær verða.

Hann sigur, at samráðingarnar eru ongan veg komnar og nú nýval er útskrivað, væntar hann ikki, at nakað stórvegis hendir aftur, fyrrenn nýggj samgonga er skipað.

– Møguliga verða onkrar samráðingar, men sáttmáli verður so ongin, fyrrenn nýggj samgonga er skipað.

Hann leggur tó afturat, at partarnir eru samdur um, at leingja sáttmálan, sum var í gildi, inntil nakað annað hendir.

Formaðurin í Skipara- og Navigatørfelagnum sigur, at í sambandi við vanliga sáttmálan, hevur Fíggjarmálaráðið bjóðað teimum somu lønarhækking, sum onnur hava fingið.

Men partarnir eru ikki heilt samdir um útrokningargrundarlagið, tí Skipara- og Navigatørfelagið vil hava, at lønarhækkingarnar skulu roknast út frá samlaðu lønini, tvs. við yvirtíð og øllum.

Kortini væntar hann, at partarnir fara at koma til eitt úrslit.

Men hvussu verður við teirri serligu lønarhækkingini til yvirmenninar, sum skulu við nýggja Smyrli, veit hann ikki.

Ellintur Abrahamsen vil onki siga, hvørji lønarkrøvini eru.

Skipara- og Navigatørfelagið hevur einar 30-35 mans við skipunum hjá Strandferðsluni.

# Ongantíð vandi á ferð

**Tá ið teir sprongdu í grótbrotinum Vesturi í Líð í Trongisvági seinnapartin mánadagin, gekk ikki sum ætlað og ein risastórur steinur bóltaði oman á vegin**



*Ein maður stendur uppi á steininum og nakrir mans standa á vegnum, so tað fæst ein hóming av, hvussu stórur steinurin var, sum bóltaði oman á vegin. Tað ein góðan tíma at rudda vegin aftur*

SPREINGIÓHAPP

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað gongur ikki altíð, sum spreingimeistarin vil!

Tað máttu teir hjá Articon sanna, tá ið teir seinnapartin mánadagin skuldi spreingja í grótbrotinum vesturi í Líð í Trongisvági.

Articon hevur gjørt grótbrot vesturi í Líð í sambandi við arbeiðið at gera nýggju samferðsluhavnina í Trongisvági og har verður grótið sprongt, sum skal brúkast til grótgarð og ífyllu.

Men mánadagin gekk sjón fyri søgn, hvussu svikaligt slíkt sprongiarbeiðið kann vera, tí tá ið skotið gekk av, bóltaði ein ovurstórur steinur oman á vegin.

Jákup Enni, sum stendur fyri arbeiðnum, sigur, at trupulleikin er, at grótið stendur í stórum blokkum og tað sum hendi var, at ein blokkur, sum stóð aftanfyri tað, sum varð skotið, reiv seg leysan og bóltaði oman á vegin.

Hann heldur, at steinurin mundi viga eini 30 tons.

Men tað var ongantíð nakar vandi á ferð, tí tá ið teir sprongja, seta teir altíð gravkýr fyri vegin báðu megin við, passaliga langt frá grótbrotinum, fyri at byrgja av so at bilar ikki sleppa at koyra.

– Vit byrgja altíð vegin av, tá ið sprongt verður, so at bilar ikki sleppa at koyra og tað gjørdu vit eisini hesuferð, sigur Jákup Enni.

Tað var klokkan 14 mánadagin at spreingióhappið hendi. Boð vóru beinanvegin send til Landsverkfrøðingin sum kunngjørdi í Útvarpinum, at vegurin varð stongdur.

Farið varð eisini beinanvegin undir at rudda vegin. Steinurin mátti borast og skjótast, men longu klokkan 15.20, ein tíma og tjúgu minuttir eftir óhappið, varð koyrandi aftur.

Jákup Enni sigur, at hetta er eitt óhapp, sum altíð kann henda, tá ið sprongt verður, men fyri at fyribyrgja at nakar skaði skal henda, seta teir altíð neyðu trygdartiltøk í verk, m.a. at byrgja vegin av.

Samstundis sigur hann, at hetta varð síðsta skotið í bergholinum í ár, tí nú er so mikið at leysum grótið, at sprongt verður ikki aftur, fyrrenn næsta ár.

### Gongur eftir ætlan

Annars sigur verkfrøðingurin hjá Articon, at arbeiðið upp á samferðsluhavnina gongur eftir ætlan.

Hann sigur, at higartil hava teir lagt eini 90.000 rúmmetrar út og tað er eftir tíðarætlanini. Tað er næstan ein triðingur av tí, sum skal koyrast.

Hann væntar, at koyringin við grótið verður liðug á Ólavsøku.

Í sambandi við koyringina hava nógv fólk, sum koyra eftir vegnum framvið grótbrotinum, funnist at, hvussu skitin og runutur, vegurin er.

Har hevur mangan ligið eitt lag av runu á vegnum við innkoyringina til grótbrotið og eitt sindur innefftir. Hetta er runa, sum bilarnir draga við sær úr grótbrotinum, út á vegin.

Serliga í vátveðri hevur tað als ikki verið vandaleyst fyri ferðsluna, tí dekkini hava ikki fingið fatur í vegnum, tá ið bilførarar hava roynt at bremsa.

Hendan trupulleikan er Jákup Enni varugur við og hann sigur, at tey hava eisini tikið stig til at loysa hann.

Vit hava fingið ein kust frá Landsverkfrøðinginum, sum stendur við grótbrotið allan dagin. Sostatt verður vegurin sópaður tvær ferðir um dagin, ella sum tørvurin er. Og hvønn fríggjadag verður vegurin sópaður serliga reinur, tí tá kemur ein bilur afturat at reinsa vegin. Og tá ið tað regnar, vaskar tað eisini rununa av vegnum.

Sostatt er hesin trupulleikin langt frá so ringur nú, sum hann hevur verið og Jákup Enni heldur, at tað, sum nú er av runu á vegnum, slepst neyvan undan, so hetta er ein trupulleiki, sum, fólk noyðast at tola fram til Ólavsøku, tá ið koyringin er liðug.

Aðrastaðni, har slíkt arbeiði er, hava lastbilarnir eitt vatnbað at koyra ígjøgnum, áðrenn teir fóru út á almennan veg fyri at teir skulu vera so reinir sum gjørligt?

– Tað hava vit eisini umhugsað, men trupulleikin við tí er, at innkoyringin til grótbrotið flytist eystureftir alla tíðina, so hvørt sum koyrt verður, so tað letur seg illa gera, sigur Jákup Enni.



# Ferðslan um Vestmannasund økt við eini helvt

**Tað er í dag eitt ár síðan, Vágatunnilin lat upp. Hetta árið hava 320.000 bilar koyrt gjøgnum tunnilin**

SAMFERÐSLA

*Edvard Joensen*

**Vágar:** Ein triðings millión bilar hava verið undir Vestmannasundi, síðan Vágatunnilin lat upp fyri einum ári síðan. Tað er umleið ein helvt fleiri, enn førdir vórðu um Vestmannasund árið fyri, latið varð upp.

Ferðslan til og úr Vágum er økt við eini helvt, síðan Vágatunnilin lat upp. Strandfaraskipini førdu umleið 210.000 bilar um Vestmannasund í 2002. Hetta árið, Vágatunnilin hevur verið opin, hava 320.000 bilar koyrt gjøgnum hann.

Tølini frá Strandfaraskipum Landsins skulu takast við fyrivarni, siga tey av skrivstovuni hjá Strandferðsluni. Tey tølini, Sosialurin fekk, vóru ikki heilt røtt, siga tey. Rætta talið er heldur hægri, verður sagt.

Verður hugt at, hvussu nógvir bilar dagliga ferðast um sundið, verður meðaltalið hjá Vágatunnilinum 880 bilar um dagin. Fyribilstalið hjá Strandferðsluni fer at liggja umleið 500-600 bilar dagliga.

Ferðslan er støðugt økt, síðan Vágatunnilin lat upp. Í januar mánað koyrdu í meðal 660 bilar dagliga gjøgnum tunnilin. Ikki óvæntað var mesta ferðslan í summar. Í juli koyrdu umleið 1.200 bilar dagliga gjøgnum Vágatunnilin. Síðan er talið minkað eitt sindur aftur, og liggur nú í meðal fyri hetta árið, opið hevur verið, á umleið 880 bilum, sum dagliga koyra undir Vestmannasundi.

*Ferðslan til og úr Vágum er økt við eini helvt, síðan Vágatunnilin lat upp fyri einum ári síðan. 320.000 bilar hava hetta árið koyrt undir Vestmannasundi*





*Tað hevur gingið betri enn væntað varð, tá børnini fyri einum ári síðan flaggaðu fyri Vágatunlinum*

### Flogrutan ger munin

Hagtølini hjá Vágatulinum vísa greitt, at tað er flogrutan, sum ger tey størstu útsløgini í ferðsluni um Vestmannasund.

Á morgni koyra 40 til 60 bilar um tíman gjøgnum tunilin. Tá so flogfarið er komið millum 11 og 12, hækkar talið til umleið 100 bilar. Tað lækkar eitt sindur aftur seinnapartin fyri so at fara upp um aftur 100 bilar millum fimm og seks á kvøldi. Tað fellur so eisini saman við, at tá eru fólk eisini á veg heim aftur frá arbeiði. Síðan minkar talið so aftur út á kvøldið, og um náttina er lítil ferðsla gjøgnum Vágatunnilin vísa hagtølini.

Hagtølini vísa eisini, at tað eru fleiri bilar við kubba enn uttan, sum koyra gjøgnum tunnilin. Hóast tølini líkjast nógv, eru kubbabilarnir heldur fleiri í tali.

### Væl nøgdur

Stjórin í partafelagnum Vágatunlinum, Dávur Reinert Hasnen, er væl nøgdur við gongdina, síðan latið varð upp.

– Ferðslan hevur verið væl meira, enn vit roknaðu við, sigur hann. Vit løgdu út við umleið 400 bilum um dagin, men tað er so meira enn tvífaldað.

Tá tað vísti seg, at ferðslan var størri enn væntað, varð prísurin lækkaður sum ein roynd at byrja við. Seinni varð hann so settur permanent til tað, vit kenna í dag, eins og 40-túrakubbin eisini varð tikin í rúk.

– Vit hava fingið tær inntøkur, vit hava brúk fyri, sigur Dávur Reinert Hansen. Nakað skal leggjast niður fyri til at brúka til umvælingar, tá tær koma, sigur hann. Men vit hava eisini fingið loyvi til at leggja eitt sindur til síðis, um tað vísir seg, at vit fáa avlop. Tað ger so aftur, at vit kunnu, um væl vil til, gjalda lánið skjótari niður enn tey 14 árini, avtalað er.

Tá tunnilin er goldin aftur, skal hann latast landinum at umsita. Og hvussu so verður við gjaldi, dugir stjórin ikki at siga nakað um í dag.

Enn er nakað tíðliga at siga nakað um broytingar í príspolitikkinum, sigur hann. Men arbeitt verður við at finna eina loysn fyri pendlararnar. Meira vil hann ikki siga, tí einki ítøkiligt er klárt enn. Men miðað verður í móti at hava okkurt klárt helst í februar ella mars, sigur hann.

## Skjóta 18. december

**Um eina góða viku verður fyrsta skotið til Norðoyatunnilin latið av**

TUNILSGERÐ

Fyrsta skotið til Norðoyartunnilin verður latið av hósdagin tann 18. december.

Hetta váttan stjórin fyri partafelagnum Norðoyartunlinum, Dávur Reinert Hansen.

Byrjað verður Eysturoyarmegin, sigur hann.

ej

# Bøta um parkeringsviðurskiftini

**Bøtt verður munandi um parkeringsviðurskiftini við flogvøllin. Eini 80 parkeringspláss verða gjørda afturat teimum verandi. Arbeiðið verðu tó ikki liðugt í ár**

PARKERING

*Edvard Joensen*

**Vágar:** Parkeringsøkið við flogvøllin í Vágum verður víðkað munandi. Á langtíðarparkeringsplássinum koma eini 60 pláss afturat, og á økinum við terminalin, sum er ætlað til styttri parkering, verða eini 18-20 nýggj parkeringspláss.

Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingurin, sigur, at talan verður ikki um at gera plássið liðugt í ár. Tað, sum gjørt verður, verður bara ráð planering, sigur hann.

Grivið er út, og økið verður so planerað. Men so verður tað liggjandi soleiðis í hvussu er til eftir ársskiftið, ella tá ein nýggj fíggjarlóg er samtykt.

Sum er hevur landsverkfrøðingurin eina hálva millión at arbeiða við, og fyri tað verður so bara planerað, sigur hann.

Til at gera liðugt við asfaltering og merking, krevst reiðiliga sama upphæddin ella kanska einar 800.000,- krónur afturat, sigur Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur.

Síðan nýggja skipanin við eftirliti á parkeringsplássunum er komin, er skilið batnað nakað væl. Men kortini er í so trongt viðhvørt. Serliga er tað á hásumri og um jóltíðir, at brúk er fyri fleiri plássum, sigur landsverkfrøðingurin.

Hann sigur, at tann ætlanin, sum farast skuldi undir í fjør niðan móti vegnum, nú fyribils er løgd til síðis.

Talan var um eina nógv størri ætlan enn hesa, nú verður gjørd. Hon varð mett at fara at kosta einar fimm milliónir. Og tá var heldur ikki asfalterað. Men bæði orsakað av tíðarneyð og manglandi peningajáttan, varð hon av ongum í fjør, sigur Oyvindur Brimnes.



*Teir eru farnir undir at planera økið til eini 80 parkeringspláss við flogvøllin í Vágum*

*Mynd: Edvard Joensen*